

*Fleiri hundrað fólk vóru hjástødd til hátíðarløtuna, tá skotið varð ígjøgnum í Vágatunlinum*
*Mynd: Jens K. Vang*

# Vágatunnilin risa framstig

**-Hetta er eitt risa framstig fyri flúgvingina og eitt nú fyri Atlantsflog. Ja, tað er nógv størri enn tað at longja flogvøllin heldur stjórin í Atlantsflogi**



VÁGATUNNIL OG FLÚGVING
*Jan Müller*

-Hetta er størsta framstig, sum er hent innan flutning millum Føroyar og umheimin, síðani flogferðslan tók seg upp í 1963. Hetta sigur stjórin í Atlantsflog, Magne Arge, sum var ein av teimum mongu gestunum, sum vórðu til steðar, tá skotið varð ígjøgnum í Vágatunlinum í farnu viku.

Magni Arge sigur, at við tunlinum hevur tú longt motorvegin úr Føroyum og út í heim. Tú hevur so eisini stytt munandi um teinin at koma uttanífrá til bæði Havnar, Runavíkar og aðrastaðni. -Eg rokni við, at tunnilin fer at gera, at fólk fara oftari á flog, tí tað fer at tykjast teimum so nógv lættari, men tað fer eisini at broyta nógv um møguleikarnar at kunna troyta flogførini, tí nú kanst tú fara avstað tíðliga á morgni, og nær tað skal vera. Tú er ikki bundin at einum bussi ella skipi sum nú. Nú kanst tú brúka flogvøllin allan dagin, tá tað ber til at koma og fara frá vøllinum, nær tað skal vera.

Magni Arge roknar tí við, at teir koma at flúgva nógv fyrr á morgni og seinni á kvøldi. Hann roknar eisini við, at tað verða størri møguleikar t.d. um summarið at brúka flogførini til eitt nú náttarflúgving suðureftir. Nakað, sum ikki ber so væl til í dag orsakað av sambandinum, har tú jú skal hava alt til at hanga saman.

- Hetta er eitt risa framstig fyri flúgvingina og eitt nú Atlantsflog. Ja, tað er nógv størri enn tað at longja flogvøllin leggur flogstjórin aftrat.

Hetta ger eisini, sigur hann víðari, at tað verður lættari at fáa fólk til at arbeiða á flogvøllinum uttan mun til hvar í landinum tey koma frá. Fólk kunnu velja hvar tey vilja búgva. Tað kann vera líka náttúrligt at búgva í Havn ella Runavík og fara til arbeiðis í Vágum.

Hetta verður tí eisini ein stórur fyrimunur fyri fyritøkuna.

Fyri Magna persónliga verður tað eisini nógv lættari. - Nú kann man leggja arbeiðið til rættis sum man vil. Man fer at spara nógva tíð. Í hvussu er hálvanannan tíma um dagin í flutningi.

Hann heldur annars, at økingin í bilaferðsluni ferða at verða øgilig, kanska nógv størri enn nakar hevur ímyndað sær.

- Kann tunnilin gera, at færri fara at brúka Norrønu og fleiri fara at brúka flogførini?

- Tað verður kanska lættari hjá okkum at kunna bjóða nakrar eyka fráferðir og harvið eisini bíligari prísir. Men hetta er hvør sín marknaður. Fólk, sum vilja fara út við egnum bili, fara við Norrønu. Og tey sum ikki dáma at sigla fara loftvegis. Norrøna fer sjálvandi at taka nógv av fólkinum, sum fer í summarfrí, men samlað kann tað fáa stóran týdning fyri okkum.

### Týdning fyri oljuvinnu

Magni Arge heldur, at tunnilin fer at hava stóran týdning fyri oljuvinnuna. Tað fer at lætta um. Hetta fer at gera, at útlendsk vinna umframt tann føroysku fara ikki at føla tað so møtimikið at arbeiða í Føroyum. At koyra hálvan tíma av flogvøllinum til Havnar er ikki meira enn tú allastaðni skal koyra til høvuðsstaðin.

- Við hesi samanbendingini hava vit skapt eina felags samanbundna eind í Føroyum, sum tilsamans nú veitir ein samanhangandi infrastruktur, ið er vælvirkandi og har eitt “flow” er í. Tað ger okkum nógv meira kappingarførar.

Magni Arge vísir á, at sum nú er sleppa teir ikki í luftina fyrr enn kl. 11, tí fólk fáa ikki verið har fyrr, uttan at tey fara upp kl. 5. - Við hesum kunnu vit kanska fara avstað 8.30. Tú skal úr Havn klokkan gott 7 og verða á flogvøllinum knappan tíma seinni og er so í Keypmannahavn klokkan 11.

Tað kemur at geva okkum nógv fleiri møguleikar. Vit fáa lagt flúgvingina øðrvísi til rættis og troytt flogførini nógv betri sigur ein fegin stjóri í Atlantsflog.



# Løgmaður um Vágatunnilin: ein hin størsta hendingin



VÁGATUNNILIN
*Jan Müller*

Millum mongu gestirnar í Vágatunlinum seinasta hósdag var eingin minni enn sjálvur løgmaður, Anfinnur Kallsberg. Og hann metti hesa løtuna so óvanliga og søguliga, at hann uttan at blunka metir hana vera eina ta størstu hendingina í sínum politiska lívi.

- Hetta er eitt nýtt kapitul. Tað, sum eg eri sera fegin um, er, at tað sær út til – og her má eg banka undir borðið - at man við hesum leistinum hevur sett út í kortið, hvussu man kann koma víðari við tílíkum útbyggingum í Føroyum. Hevði henda fyrsta tunnilsgerðin av sínum slag ikki verið væleyndað, tá hevði fingið drúgv tíð, áðrenn tú vágaði tær út í enn eina slíka útbygging aftur. Tí hevur tað ótrúliga stóran týdning, at henda fyrsta verkætlanin verður væleydnað.

Løgmaður vónar annars, at øll tey ivamálini, sum mundu vera, eru uppklárað. Sjálvt um vit renna okkum í nakrar trupulleikar í tí næstu verkætlanini so merkir tað ikki, at hetta er nakað, sum fer at endurtaka seg aftur og aftur. Tí er hetta sum nú hendir so týdningarmikið. Løgmaður ynskir øllum teimum, sum hava gjørt ætlanina møguliga, tillukku.

# Norðoyatunnilin næsta avbjóðingin

UNDIRSJÓVARTUNLAR
*Jan Müller*

Hóast undirsjóvartunnilin millum Eysturoynna og Borðoynna enn bert er í hugaheiminum hjá fólki, so heldur løgmaður, at henda risastóra verkætlanin longu nú átti at fingið eitt navn. Nú tunnilin undir Vestmannasund, sum bindur Streymoynna og Vágoynna saman, hevur fingið navnið Vágatunnilin heldur løgmaður tað vera heilt náttúrligt at kalla undirsjóvartunnilin undir Lorvíksfjørð fyri Noyðoyatunnilin. – Vónandi taki eg ikki munnin ov fullan, men tað er greitt, at hetta navnið man verða góðtikið av øllum íbúgvunum í Norðoyggjum, tí tað er fyrst og fremst teimum hann skal gagna.

Anfinnur Kallberg heldur tað vera rætt nú at fara undir at tilrættaleggja hetta tunnilsprojektið, sum hann eisini metir kann fáa stóran samfelagsligan týdning. Meðan Vágatunnilin nøktar ein tørv hjá øllum føroyingum og ikki minst vágafólki, so hevur tunnilin til Norðoyggjar ikki minni týdning, tá hugsað verður um, hvussu stóran vinnuligan týdning nettup hesin parturin av landinum hevur fyri allan samfelagsbúskapin. Løgmaður heldur, at vit nú eiga at brúka royndirnar frá Vágatunlinum til at seta út í kortið næsta undirsjóvartunnilin í landinum.



Nær hesin skal standa liðugur hevur løgmaður einki boð uppá. Hann heldur, at tað mugu vit lata vera upp til eina skipaða og væl tillrættalagda gongd. Hetta er eitt so stórt arbeiði, at einki má latast upp til tilvildina. Við royndunum frá Vágatunlinum sum barrlast heldur løgmaður, at tað verður ein stór avbjóðing at fara undir næsta tunnilin av hesum slag. Hann ynskir vágafólki og øllum føroyingum og eisini teimum útlendingum, sum hava gjørt hetta møguligt hjartaliga tillukku. Her er talan um eitt væl útint verk, sum hevur sín fulla stuðul í øllum tí føroyska fólkinum. Tað sama vónar hann fyri Norðoyatunnilin.